*Signar á Brúnni undan orðaskiftinum í dag um almennu roknskapirnar:*

# Skipanin førir landsstýrismenn út í óføri

*-Vit hava eina høvuðslóg, sum er stýrisskipanarlógin, vit hava eina kringvarpslóggávu, vit hava lóg um roknskaparhald, og vit hava játtanarlógir. Har eri eg samdur við løgmann um, at tú kanst handla soleiðis, at tú ger rætt eftir eini lóg men brýtur eina aðra lóg við at handla. Skipanin sjálv førir landsstýrismenninar út í eitt óføri. Hetta kann ikki vera rætt. Tí haldi eg eisini, at man átti at hugt skipanina ígjøgnum og fingið serfrøðingar at hugt eftir og kanna hesar andsøgnir og harvið rættað tær, soleiðis at øll skipanin hongur saman.*



JAN MÜLLER

Í dag fer tingið undir at viðgera almennu grannskoðaðu roknskapirnar. Signar á Brúnni, fyrrv. landsstýrismaður veit enn ikki, um hann fer at luttaka í orðaskiftinum, nú hann hevur kravt og fingið játtað eina kanning. Men hann vil undan orðaskiftinum fegin koma við nøkrum viðmerkingum til málið, um tað kann vera við til at lýsa málið betur.

Signar á Brúnni sigur, at tá ið hetta málið stingur seg upp, fór umsitingin í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum beinanvegin í gongd við at greiða tað. Men av tí at bæði Sjónvarpið og grannskoðari sjónvarpsins vissaðu tey um, at sjónvarpið ikki fór at koma í gjaldføristrupulleikar fyrr enn í september var ikki farið beinleiðis til Fíggjarnevndina í apríl mánað. Ístaðin varð arbeitt við málinum fyri at fáa greiðu á, hvussu stórur gjaldføristørvurin fór at verða, og álagt varð sjónvarpinum at rapportera um fíggjarligu støðuna mánaðarliga til Undirvísingar- og Mentamálatýrið. Men so knappliga, 15. juli fáa teir at vita, at kassin er tómur, og at peningur ikki er til lønir og rokningar. Frá Fíggjarmálastýrinum fingu teir at vita, at landskassin var bundin av krøvunum móti sjónvarpinum og var tí alt fyri eitt farið undir at gera eitt fíggjarnevndarskjal fyri at útvega sjóvnarpinum gjaldføri. Fíggjarnevndarskjalið varð samtykt á landsstýrisfundi og undirritað av Karsten Hansen og Signar á Brúnni sjálvum. Men í Fíggjarnevndini varð málið tó steðgað.

Signar á Brúnni dylur ikki yvir, at hann var sera hugstoyttur av, at Fíggjarnevndin ikki avgreiddi hetta málið, tí tað var eftir hansara metan alt, sum talaði fyri, at Fíggjarnevndin kundi avgreiða eitt slíkt mál. Talan var jú um eina bráfeingis hjálp, sum Sjónvarp Føroya hevði fyri neyðini, men tað var sum kunnugt avvíst. Fíggjarnevndin mælti ístaðin til at fara í tingið við málinum og har biðja um eina játtan.

Eftir at hava umrøtt tann møguleikan, kom Signar á Brúnni fram til, at tað bar sera illa til at kalla tingið saman seinast í juli til at avgreiða eitt slíkt mál. Tað hevði rætt og slætt tikið so drúgva tíð við at kalla tingið saman og viðgjørt málið, at tað hevði farið út um ta tíðina, sum Undirvísingar- og Mentamálastýrið var bundið av at handla og fáa lønirnar út. Tí varð stig tikið at fara í gjaldførið eftir peninginum.

## Allir ráðgevar komu til somu niðurstøðu

-Tað er so vist og sætt, at man gjørdi sær ómetaliga stóran ómak við at kanna, um hetta ikki var tað rætta. Ráðgevar mínir brúktu tíð og orku uppá at kanna málið fyri at vissa seg um, at vit einki stig tóku, sum varð skeivt. Eg fór eisini út um mítt egna stýri fyri at kanna og fáa metingar til málið. M.a. vóru ráðgevar frá Fíggjarmálastýrinum settir til at umrøða málið. Allir vóru samdir um, at hatta var tað rætta at gera.

Signar á Brúnni vísir á, at ráðini frá Fíggjarmálastýrinum vóru tey, at landskassin hevði skyldu til at rinda peningin út til lønir, og tí mátti tað gerast. Annars vísa teir til tað, sum stendur í fylgiskjølunum til fíggjarløgtingslógina fyri 99 um játtanir, eykajáttanir og aðra játtan. Har kemur ein grein, sum eitur nýggjar og broyttar atgerðir í fíggjarárinum, og aktuella málið er í tí fíggjarárinum.

Í tí greinini stendur m.a. um útreiðslur uttan játtan:

„Harumframt kann á sama hátt rindast fyri útreiðslur, sum landið sambart dóm hevur skyldu til at rinda ella um tað má metast sum rættiliga sannlíkt, at landið hevði fingið tað álagt, um málið fór í rættin.“

-Hetta er tann greinin, sum løgfrøðingar hava víst á, at vit hava handlað eftir í sambandi við, at vit eru farnir eftir pengum í gjaldførinum. Allir ráðgevarar vóru púra samdir. Eg kann leggja aftrat, at umframt Fíggjarmálastýrið og okkara egnu ráðgevar, so fekk eg eisini ráðgeving frá serfrøðingum uttan fyri stýrini. Eisini teir komu til somu niðurstøðu, at vit vóru noyddir at gera soleiðis, tá vit vóru komnir í hesa støðu.

Signar á Brúnni greiddi, áðrenn hann tók endaligu avgerðina, øllum landsstýrinum frá, at tað var neyðugt at taka hatta stigið. Sostatt var landsstýrið kunnað um alt málið, og hvat stig fór at verða tikið í málinum. Landsstýrismenninir ásannaðu eisini, at tað var neyðugt at taka hatta stigið.

*-Vil tú við tí siga, at um tú er sekur í at hava gjørt nakað skeivt, so eru hinir landsstýrismenninir medsekir?*

-Tað kunnu onnur døma um. Eg kann bert siga, at eg kunnaði um hetta málið. Sjálvur havi eg altíð lagt dent á ikki at taka nøkur stig, sum bera bráð av at vera skeiv. Landsstýrið samtykti einki á tí fundinum, men har var eingin í landsstýrinum, sum segði seg at vera ósamdan í tí stigi, sum tikið bleiv. Annars kann eg upplýsa, at vit longu tann 23. juli eisini sendu umsókn um eykajáttin til Fíggjarmálastýrið. Men henda umsókn bleiv ikki løgd fyri tingið fyrr enn í september, og hon varð samtykt í oktober.

Av eini ella aðrari orsøk er hetta málið blást upp í fjølmiðlunum. Hví veit eg ikki. Men týsdagin skal tingið viðgera allar landskassaroknskapirnar, og tá verða eisini onnur líknandi mál viðgjørd.

Signar á Brúnni heldur tað verður áhugavert at hoyra, hvat tingmenn fara at siga um hini málini eisini.

## Gevur løgmanni rætt

*-Nú málið hevur fingið fylgjur fyri teg, metir tú tá eisini, at tað eigur at fáa fylgjur fyri hinar landsstýrismenninar, sum hava brúkt meira enn játtað er?*

-Eg vil í hesum sambandi bara vísa á tað, sum Anfinn Kallsberg, løgmaður sigur við Sosialin leygardagin. Hann sigur, at lógirnar í veruleikanum eru í andsøgn við hvørja aðra. Vit hava eina høvuðslóg, sum er stýrisskipanarlógin, vit hava eina kringvarpslóggávu, vit hava lóg um roknskaparhald, og vit hava játtanarlógir. Har eri eg samdur við løgmann um, at tú kanst handla soleiðis, at tú ger rætt eftir eini lóg men brýtur eina aðra lóg við at handla. Tvs. at skipanin sjálv førir landsstýrismenninar út í eitt óføri. Hetta kann ikki vera rætt. Tí haldi eg eisini, at man átti at hugt skipanina ígjøgnum og fingið serfrøðingar at hugt eftir og kanna hesar andsøgnir og harvið rættað tær, soleiðis at øll skipanin hongur saman. Tað haldi eg allir ásanna.

*-Hvat so við kanningini, sum tú kravdi at fáa?*

-Eg havi ikki áhuga í at draga nakran annan við mær út á síðulinjuna, har eg standi í løtuni. Men skuldi málið verið orsøk til at givið mær misálit, so vildi eg heldur sjálvur fara út síðulinjuna, meðan tað bleiv kannð. Eg havi so kravt av løgmanni, at eg vil hava málið kannað og at tað verður víst mær á, hvat eg havi gjørt skeivt. Og eg haldi fast um, at eg havi einki skeivt gjørt.

Signar á Brúnni vísir annars á, at tá løgmaður sigur við Sosialin, at hann ikki beinleiðis hevur sagt ja til eina kanning, so er tað ikki beint. -Eg veit ikki um hann er misskiltur. Tí løgmaður segði við meg, at hetta bleiv einki problem.

Signar á Brúnni skilur annars væl løgmann, tá hann sigur í sama viðtali við Sosialin, at hann vil sleppa at lurta eftir orðaskiftinum í tinginum, áðrenn hann endaliga tekur eina støðu í sambandi við kanning ol. Sjálvur heldur hann eisini, at málið átti at verið viðgjørt í tinginum, áðrenn tað bleiv umrøtt og blást upp í fjølmiðlunum.

## Tjóðveldisflokkurin tók undir við kanning

*-Roknar tú við, at tín egni flokkur, Tjóðveldisflokkurin tekur stig til at fáa eina kanning gjørda, um løgmaður ikki ger ella kann tað.*

-Tað veit eg ikki, men flokkurin varð í hvussu so er samdur um, at eg átti at fáa eina kanning, nú eg fór út á síðulinjuna.

*-Roknar tú við at fáa starvið sum landsstýrismaður aftur eftir eina kanning?*

-Ja, tað var tað sum lá í tí, at eg tók meg aftur. Signar á Brúnni heldur annars ikki, at ein kanning skuldi tikið drúgva tíð, tí málið er so greitt.

-Eg vil ikki hava sitandi á mær, at eg havi gjørt nakað ólógligt. Tað, sum hevur størstan týdning fyri meg, er at verða reinsaður.

*-Fer Signar á Brúnni at luttaka í orðaskiftinum á tingi týsdagin?*

-Eg eri rættuliga ivingarsamur, hvat er skeivt og rætt. Við tað at eg havi kravt eina kanning og fingið játtan um tað, so er tað kanska ikki rætt av mær at luttaka í orðaskiftinum.

# Rás 2 hoyrist nú í Klaksvík

Leygardagin tók Rás 2 nýggja sendaran á Brúnaskarði í Klaksvík í brúk, og nú hoyrir meira enn helmingurin av Føroya fólki Rás 2.

Rás 2 hoyrist nú í Klaksvík, meginpartinum av Eysturoynni, í Havn, lutvíst í Suðurstreymoy og onkrastaðni á Sandoynni. Talan er um 28.000 fólk tilsamans, sum kunnu skrúva á Rás 2.

Norðoya Sparikassi hevur stuðlað Rás 2 við sendaranum, sum nú er settur upp á Brúnaskarði.

Sunnudagin 30. apríl fer Studio Pegasus í Klaksvík undir at senda útvarp á Rás 2. Talan verður um fimm tímar hvørt sunnukvøld. Hetta er fyrstu ferð, at farið verður undir at senda útvarp regluliga úr Klaksvík.

Rás 2 sendir á 107,0 MHz á Brúnaskarði.

**ek**

# Pyjamas fyri fullum húsum

Skemtileikurin *Seks í pyjamas,* sum Klaksvíkar Sjónleikarfelag spælir, gongur fyri fullum húsum. Seinastu tvær vikurnar hava 1100 fólk sæð leikin, sum verður spældur í Atlantis í Klaksvík.

Sunnudagin var seinasta sýning av leikinum, men eisini hesaferð varð útselt, og tí verður eykasýning í kvøld

Fríggjakvøldið verður *Seks í Pyjamas* vístur í Sjónleikarhúsinum í Havn, og tað verður hann eisini tvær ferðir leygardagin og eina ferð sunnudagin.

Í mai mánaði verður leikurin sýndur í Hvalba og á Oyrabakka.

**ek**





AVBJÓÐINGAR Í NÝGGJA BÚSKAPINUM

Fjarskifti og kunningartøkni mennast alsamt skjótari um allan heim, og tann týdningur, sum hetta hevur fyri búskapin í teimum einstøku londunum gerst alsamt størri. Búskaparfrøðingar tosa um ein "nýggjan búskap", har vøkstur og framburður verða beinleiðis tengdir at kunningartøkniliga støðinum í landinum. Í hesum verða fjarskiftistænastur og fjarskiftiskostnaður aloftast nevnd sum ein tann mest avgerandi fortreytin fyri framburði.

Týdningurin av nýggju búskaparmenningini er ikki minni í Føroyum enn aðrastaðni, heldur hinvegin. Fjarskotna støða Føroya ger, at føroyingar fáa serligar fyrimunir av skjótu menningini á fjarskiftisøkinum, og eitt tað besta dømið um hetta er, at internetið hevur við sær, at týdningurin av fjarstøðu og flutningstíð minkar alsamt.

Føroya Tele hevur sum aðalendamál, at føroyingar skulu kunna gagnnýta menningina á fjarskiftis- og kunningartøkniliga økinum á best møguligan hátt. Hetta setur stór krøv til Føroya Tele, sum er ein av størstu fyritøkunum í Føroyum. Til tess at styrkja fyritøkuna uppaftur meira og at menna seg víðari til nýggjar avbjóðingar søkir Føroya Tele eftir starvsfólkum, sum hvørt á sínum øki fær møguleika at luttaka í spennandi avbjóðingunum, ið eru fyri framman.

Hevur tú hug at luttaka í hesum, og sært tú teg føra/føran fyri at røkja eitt av niðanfyristandandi størvum, vilja vit fegin hoyra frá tær.

Deildarstjóri til Marknaðardeildina

Virkandi deildarstjórin á Marknaðardeildini hevur søkt sær nýggjar avbjóðingar uttanlands, og er tí neyðugt hjá Føroya Tele at leita sær nýggjan deildarstjóra til hetta áhugaverda øki.

Deildarstjórin myndar leiðslubólkin saman við stjóranum og deildarstjórunum fyri fíggjardeild og teknisku deild.

**Marknaðardeildin, sum telur uml. 70 starvsfólk, er skipað við hesum undirdeildum og stápum:**
- Tænastumiðstøðin
- Meginumvælingin
- Teleforlagið
- Telebúðir
- Internetdeildin
- Vinnudeildin
- Montørar
- Tænastumenning og marknaðarføring

Harumframt vísa 6 økisleiðarar til marknaðardeildina í øllum marknaðarmálum.
Marknaðardeildin er andlit Føroya Tele út til viðskiftafólkið. Uppgávurnar eru í høvuðsheitum at menna tænastuútboðið og tænastustigið, at menna og fyriskipa marknaðarætlanir, marknaðarkanningar, lýsingar- og sølutiltøk umframt mannagongdir, góðskustýring og samstarvsavtalur við aðrar fyritøkur.

**Ábyrgdin hjá deildarstjóranum verður, umframt ábyrgdina av oman-fyristandandi, at:**
- menna andlit Føroya Tele úteftir og økja um kappingarførið
- síggja til, at starvsfólkið hevur neyðugu førleikarnar til at røkja uppgávurnar
- saman við leiðslubólkinum og starvsfólki annars at leggja marknaðarstrategir fyri Føroya Tele og marknaðarætlanir fyri virkisøkini á Føroya Tele
- rakstrar-, íløgu- og tíðarætlanir halda

Umráðandi er, at umsøkjarin hevur tøknifrøðiligt og/ella fíggjarligt innlit og royndir. Harumframt er tað ein fyrimunur at hava hollan kunnleika til marknaðarviðurskiftini á fjarskiftisøkinum.

**Útbúgving** : Ástøðilig útbúgving frá hægri lærustovni t.d. verkfrøðingur,- cand. oecon., cand. merc.

**Umráðandi er, at viðkomandi, ið settur verður**
- hevur góð samstarvsevnir og áhuga fyri trivnaði starvsfólksins
- hevur leiðsluroyndir frá líknandi starvi innan taðalmenna ella privata vinnulívið
- dámar stórar avbjóðingar, dugir at geva frá sær uppgávur og eggja øðrum til at taka við avbjóðingum
- hevur hollan kunnleika til EDV
- hevur royndir í at arbeiða í altjóða umhvørvi
- dugir enskt á samráðingarstigi
- trívist í einum umhvørvi, sum broytist frá degi til dags
- hevur áræði og er ágrýtin

Meira fæst at vita um starvið frá Andras Róin, stjóra, tlf. 303030.

Løn sambært avtalu.

Grafikari/DTP´ari til Teleforlagið

Hevur tú arbeitt við framtakshugaðum og framkomnum lýsingaloysnum á Macintosh-teldum? Ella ert tú ein royndur ritmyndari/DTP´ari við heimstaði í grafiska umhvørvinum? Og hevur tú hug at menna og formgeva digitala uppseting? Um so er, ert tú møguliga tann vit fara at seta í starv. Sum høvuðsarbeiðsuppgávu fært tú ábyrgd av at umsita ritmyndapartin av føroysku telefonbókini og samstundis eisini grafiska partin av www.gulu.fo hjá Føroya Tele.

**Arbeiðsuppgávurnar eru:**
- menning av verandi grafiskum loysnum
- nýtslu av serútgerð o.ø. tólbúnaði m.a. Mac G4 450 MHz
- at veita viðskiftafólki ráðgeving

**Førleikar og royndir hjá umsøkjaranum:**
- at kunna arbeiða við Mac og hava kunnleika og royndir við: Quark express, Photoshop 4.0/5.0 og Illustrator 8.0
- at hava yvirlit og klára at raðfesta uppgávur eftir týdningi í mun til givin evstumørk
- at hava góð skapandi evni og vera hugskotskveikjandi
- útbúgving innan Grafik/DTP ella møguliga aðra viðkomandi útbúgving

Meira fæst at vita um starvið frá Jens Paula G. Nolsøe, tlf. 30 30 30

Web-forritari til Internetdeildina

Hevur tú arbeitt við framtakshugaðum og framkomnum web-loysnum? Ella ert tú ein royndur softwarekonsulentur við heimstaði í servara umhvørvinum? Og hevur tú hug til menning, forritan og innlegging av ymiskum internet forritum? Um so er, ert tú møguliga tann, vit fara at seta í starv. Sum høvuðsarbeiðsuppgávu fært tú ábyrgd av at umsita forritapartin av nýggja Portalinum og samstundis eisini heimasíðuni www.tele.fo hjá Føroya Tele.

**Arbeiðsuppgávurnar eru:**
- menning av verandi internettænastum, herundir forritan av serútgerð, brúkara-interface o.ø. tólbúnaði
- at búna nýggjar internet tænastur
- at veita viðskiftafólki ráðgeving

**Førleikar og royndir hjá umsøkjaranum:**
- kunnleiki og royndir innan TCP/IP, Internet og Unix
- kunnleiki til Windows-NT, IIS / Apache webservara
- kunnleiki til forritan í: Adobe GOLive, ASP, SQL, Perl., C++, Visual Basic.
- hava hugsjónir um internet
- duga enskt
- EDV-útbúgving, tekniska útbúgving ella møguliga aðra viðkomandi útbúgving

Meira fæst at vita um starvið frá Páll Wiberg Joensen, tlf. 30 30 30.

Starvsfólk til Internetdeildina

Hevur tú hug at arbeiða innan eitt øki í støðugari menning, og við nógvum avbjóðingum, har vit leggja stóran dent á at verða fremst innan hesa tøkni í Føroyum, ert tú møguliga tann rætti persónurin at starvast á okkara deild. Sum høvuðsuppgávu fært tú ábyrgd av rakstri, viðlíkahaldi og nýuppsetan av ymiskari internetútgerð.

**Arbeiðsuppgávurnar eru:**
- umsiting og menning av internetkervinum, herundir uppseting av beinarum (routarum), ambætarum o.ø. tólbúnaði.
- uppseting og viðlíkahald av vev-, post- og navnaøkis ambætarum
- búna nýggjar internettænastur
- veita viðskiftafólki ráðgeving
- veita stovnum og virkjum fast tilknýti til internetið

**Førleikar og royndir hjá umsøkjaranum**
**Tað er eitt krav at:**
- hava kunnleika og royndir innan TCP/IP
- hava kunnleika og royndir innan internet

**Tað er ein fyrimunur at hava kunnleika og royndir innan:**
- Stýri-skipanir: HP-Unix, Solaris, Windows-NT, Linux
- Tólbúnað: Cisco7500/3600/2500/1600,/AS5300, HP9000 R/L Class, HP B1000, Sun Ultra.
- Forrit: HP Openview, Cisco Netflow Collector/Analyzer, Radius
- IP beinara-net, IP "veiting/lutan", IP Subnet, "masking"
- DNS tænastu

**Útbúgving:**
EDV-útbúgving, tekniska útbúgving ella møguliga aðra viðkomandi útbúgving og duga enskt

Meira fæst at vita um starvið frá Páll Wiberg Joensen, tlf. 30 30 30.

Søluráðgevar til Vinnudeildina

Til Vinnudeildina verður søkt eftir søluráðgevum, sum skulu taka sær av sølu av samskiftisútgerð og hartil hoyrandi samskiftisvørum, tænastum og trafikki, og serloysnum sum t.d. mobilitet og tænastumiðstøðir til vinnukundar.

**Arbeiðsuppgávurnar eru:**
Ráðgevarnir hava fastan kundalista og skulu veita kundum sínum røkt og ráðgeving í samsvari við tey mál, sum sett eru.
Ráðgevarnir hava egna fíggjarætlan og teir hava ábyrgdina av ætlanin verður løgd og fylgd.

Kundarnir skulu røkjast soleiðis, at vitan um teirra tørv altíð er dagførd. Stórur dentur verður lagdur á at vera frammanfyri virksemi kundans.

**Aðrar uppgávur:**
- rokna út tilboð
- vera við á kundaseminarum
- geva frágreiðingar (rapportering)
- vera við á fundum við leiðaranum á Vinnudeildini, sølufundum og deildarfundum
- gera fíggjarligar útgreiningar, har stórur dentur verður á fíggjarligt meðvit

**Førleikar og royndir hjá umsøkjarum:**
- hava søluroyndir og kunna vísa á úrslit
- hava persónligan myndugleika, sum virkar sjálvstøðugur í vinnuumhvørvinum
- hava kunnleika til kunningartøkni
- kunna samskifta á høgum yrkisstøði
- kunna taka nýggj stig og vera yrkismeðvitandi
- vera skapandi og virkistúsur
- kunna taka avgerðin innan karmar Vinnudeildarinnar

Tann ið settur verður, skal kunna arbeiða í einum sera virknum umhvørvi, har tað av og á er neyðugt at arbeiða eftir vanliga arbeiðstíð.

Afturfyri lova vit neyðugu útbúgvingina og ein spennandi arbeiðsdag við sjálvstøðugum uppgávum.

Meira fæst at vita frá Erik E. Thomsen, tlf. 303328 ella Poul Henrik Poulsen, tlf. 303303.

Starvsfólk til Teknistovuna

Á Teknistovuni er eitt starv leyst at søkja. Í dag starvast 8 fólk á Teknistovuni, og arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um at skráseta telefon-kaðalnetið á EDV, m.a. við tekniforritinum MicroStation.

**Arbeiðsuppgávurnar eru:**
- avmerking av kaðalum í sambandi við graviarbeiði
- skráseting við MicroStation
- fyrifallandi teknistovuarbeiði

**Førleikar og royndir hjá umsøkjaranum:**
- tekniskur hjálpari ella landmátsteknikari
- kunnleiki til teknistovuarbeiði
- hava koyrikort

Arbeiðsøkið er Tórshavn, men kann eisini verða uttan fyri Tórshavn og útiarbeiði kann koma fyri í øllum veðri.

Meira fæst at vita um starvið frá Asker Hansen, tlf. 30 32 94 ella Kára Dal-Christiansen, tlf. 30 33 41.

Starvsfólk til Føroya Tele í Klaksvík

Norðoyggjar eru ein av ídnaðardeplunum í Føroyum, og menningin á fjarskiftisøkinum er eisini stór í Norðoyggjum. Hetta hevur økt arbeiðsbyrðuna hjá Føroya Tele munandi, og fyri at fylgja menningini er tørvur á einum ágrýtnum starvsfólki til ymiskt umsitingarligt arbeiði. Talan er um fulltíðarstarv.

**Arbeiðsuppgávurnar eru:**
- bókingar og skráseting í telduskipanum
- viðlíkahald av kaðalskrásetingum
- goymslustýring
- telefonavgreiðsla
- hjálparfólk og avloysari í Telebúðini
- annað fyrifallandi arbeiði

Arbeiðið er fjølbroytt og nógv er at seta seg inn í. Tí er tað sera týðandi at vísa vilja til at læra tað, sum er neyðugt.

**Førleikar og royndir hjá umsøkjaranum:**
- skrivstovuútbúgving
- teldukunnleiki innan m.a. tekstviðgerð og bókhald
- royndir við skráseting og bókhaldi

Meiri fæst at vita um starvið frá Pól Sundskarð, leiðara, tlf. 455488.

Hetta leggja vit dent á...

Føroya Tele leggur dent á at veita starvsfólkunum góðar og áhugaverdar arbeiðsumstøður, har møguleiki er fyri viðkomandi skeiðum og útbúgving.

**Vit hugsa okkum at tey, ið søkja størvini:**
- eru virkin og nærløgd
- duga at arbeiða sjálvstøðugt
- eru opin og fyrikomandi
- eru løtt at samstarva við

Størvini verða lønt sambært sáttmálum við avvarðandi yrkisfeløg ella eftir førleikum og verða sett skjótast gjørligt. Umsóknir við avritum av prógvum, c.v. og møguligum arbeiðsroyndum skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi hósdagin 27. apríl 2000, og skulu sendast til :

**Føroya Tele**
**Att.: Starvsfólkadeildin**
**Postrúm 27**
**110 Tórshavn**

FØROYA TELE

Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo